T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Skrivstovunæmingur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovunæmingi.

**Vit bjóða**
tær eina fjølbroytta og áhugaverda skrivstovuútbúgving innan almenna fyrisiting. Praktiski parturin av útbúgvingini verður í høvuðsumsitinginí hjá kommununi, meðan skúlagongdin verður í Danmark.

Tórshavnar kommuna hevur yvir 800 fólk í starvi, og taka hesi sær av alskyns uppgávum í býnum. Sum næmingur hjá kommununi, fært tú eitt sera gott innlit í kommunal viðurskifti. Tú kemur at læra at brúka allar hentleikar, sum hoyra til eina nútímans skrivstovu, t.d. internet, e-mail, elektroniska journal, lønar- og roknskaparskipanir, elektroniskar peningaflytanir umframt vanlig skrivstovuforrit.

Lærutíðin er vanliga um 2 ár, men tað velst um, hvørja útbúgving tú hevur innan læruna.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett miðjan august ella sambært avtalu. Løn sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Tórshavnar kommunu.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við HH-prógvi ella studentsprógvi hava fyrimun.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt (janus@torshavn.fo) ella Oskar Neshamar (oskar@torshavn.fo), tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postbox 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 9. juli 2001. Viðmerk á umsóknina "Skrivstovunæmingur".

S N A R S K I V A N

## Mentamálastýrið

# Deildarstjóri til Fólkaskúladeildina

***Starvið:***
Nú deildarstjóri okkara fer úr starvi fyri aldur, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í Fólkaskúladeildini.

Mentamálastýrið er skipað í 3 deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og Miðnámsskúladeild og Mentamáladeild.

Høvuðsuppgávurnar hjá Fólkaskúladeildini eru at:
- Fyrisita hægru umsitingina av fólkaskúlanum og øðrum skúlum og stovnum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar og stovnarnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, gera uppskot um lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv við aðrar skúlar o.o., ið varða av økinum

Deildarstjórin er leiðari á Fólkaskúladeildini, og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

***Førleikakrøv***
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla ella læraraútbúgving við viðkomandi eftirútbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt menningarandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við aðrar skúlar og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum

***Vit bjóða:***
Mentamálastýrið mennist alsamt, og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarvi.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Møguleiki er fyri, um so er at umsøkjari er tænastumaður frammanundan, at halda fram sum tænastumaður. Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá Tænastumanna-felagi Landsins. Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fatar um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2001. Starvið verður sett frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálastýrinum, á tlf.

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í **Fólkaskúladeildini** eru fólkaskúlarnir (uml. 60 í tali), Landsmiðstøðin fyri undirvísingarambоð, Musikkskúlar, Sernámsfrøðiligt virksemi, Føroya Skúlabókagrunnur, Føroya Fólkaháskúli, Húsarhaldsskúli Føroya og frítíðarundirvísingin.*

**Elin Danielsen**
**Útb. fysioterapeutur**
Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77

$O_2$

ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG
HITA · MASSAGU · LINNA

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

KIA CARNIVAL

2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar



Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.

D. B. Bilar
Tel. 310 600

VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SÁGING
Rennir, keiðki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898



# Astmadagur í Apotksútsøluni í Runavík

Mikudagin 27. juni kl 10.00 - 17.30 skipar Apoteksútsølan í Runavík fyri ymiskum tiltøkum í samband við astma.

· Peakflow máting ·
· Koliltumáting ·
· Nýtslu av astmatilbúningum o.ø. ·

TJALDURS APOTEKIÐ

# Tann føroyski Hárfríðkanarskúlin

Tann 01.09.01 taka vit 3 næmingar inn.

Krav: 9. flokkur. Tú skalt somuleiðis dáma væl at fáast við hár og smyrsl. Tú kanst læra í eitt ella tvey ár.

**1. árið fevnir um:**
- fatan av tilfari, stíl, form og farvu
- reinføri
- søla & tænasta
- ergonomi
- hárvask
- høvuðurbotnsmassaga
- permanent
  teori og praktik
- farva
  teori og praktik
- klipp av damum og harrum
- uppsetan av hári

*Árið endar við roynd.*



**2. árið er framhald og fevnir um:**
- vatnondullatión
- serliga klipping
- serliga uppsetan (t.d. brúðar- og veitsludám)
- brýr og vippur
- smyrsl og kunstigar negl
- piercing
- og nógvar erfaringar

*Árið endar við roynd og diplom um royndin er lokin*

Skriva nøkur orð um teg sjálvan og send tað til

Tann føroyski Hárfríðkanarskúlin
Niels Finsensgøta 10
110 Tórshavn



# JUNGLUTRUMMU-SLÁARAR SØKJAST ...

Vit eru eitt vælvirkandi orkestur við nógvum spennandi uppgávum, men okkum tørvar tveir nýggjar junglutrummusláarar - gjarna við royndum - at byrja skjótast gjørligt.
Við hvørt spæla vit andante, men sum oftast er tað full ferð á kassanum.
Um tónaartin er PC ella Mac er ikki áhugavert. Samljóð og kreativitetur eru tað harafturímóti!

Um tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, ert kreativ/ur og før/ur fyri at framleiða væl og skjótt og kanst svara játtandi upp á minst tríggjar av útsøgnunum niðanfyri, so ert tú kanska rætti persónurin:

❑ Eg dugi væl at brúka InDesign ella QuarkXpress

❑ Eg dugi væl at brúka CorelDraw Adobe Illustrator ella FreeHand

❑ Eg dugi væl at brúka PhotoShop

❑ Eg dugi væl at brúka DreamWeaver

❑ Eg dugi væl at arbeiða við 3D og video

Heldur tú teg hava staðið royndina og hevur tú hug at gerast partur av einum góðum orkestri, so skalt tú ikki ivast, men skriva eina umsókn í stundini ella í seinasta lagi 10. juli 2001 og senda hana saman við viðmæl-um og dømum um gjørdar uppgávur til adressuna niðanfyri.
Lønina tosa vit um, og er okkurt annað, tær tørvar at spyrja um, kanst tú ringja tel 316511 og spyrja eftir Johnny Gaard, stjóra.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

team 85

Hoyvíksvegur 59, Postboks 3138, FO-110 Tórshavn
Tel 316511, Fax 310390, www.team85.fo, jg@team85.fo

*Team 85 er reklamuvirki við 10 starvsfólkum. Kundar okkara eru fyritøkur í privata vinnulívinum og stovnar, m.a. Agip Faroe Branch, Atlantic Supply Base, Ferðaráð Føroya, Föroya Bjór, Føroya Shell, Føroya Sparikassi, FøroyaTele, Kloosterboer, LM-Handilin, Løgmansskrivstovan, Menningarstovan, North Atlantic Fish Fair, Smyril Line, Tórshavnar kommuna, Vónin o.m.a. Umframt vanligt reklamuvirksemi framleiðir Team 85 eisini sjónvarpslýsingar, og í beinleiðis sambandi við teknistovuna hevur Team 85 framkomna verkstovu, har framleidd verða lýsingaskelti, framsýningabásar, bilprýðingar, busslýsingar, útprent í stórum støddum v.m.*